

Mynd: Sunva Ey. Lassen

*Áðrenn farið verður í føroysku klæðini, skal frúan, Hjørdis, sjálvandi góðkenna og ansa eftir, at alt situr, sum tað skal*

# Skyldan er ein stuttleiki

**Hóast hann sum borgarstjóri hevur hópin av formligum skyldum, so heldur Heðin Mortensen ikki, at tað tekur nakað av stuttleikanum ella gleðini við tjóðarhátíðini**

**ÓLAVSØKA**

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá Heðin Mortensen verður spurdur, hvussu hann ætlar sær at halda ólavsøku, stendur skjótt greitt, at ein slík er meira rokað hjá einum borgarstjóra enn hjá flestu av hinum havnarborgarunum.

– Fyrst og fremst so eru hópin av fyrireikingunum til ólavsøkuna. Ein rúgva av tiltøkum verða fyriskipað, og hjá okkum er setningurin at fáa skránna soleiðis samansetta, at alt ikki rennur saman. Og longu í teimum fyrireikingunum byrjar ólavsøkan fyri mítt viðkomandi. Alt – frá Gundadali til Molan – skal jú passa saman.

– Tí fari eg sjáldan til hús, fyrr enn seint dagin fyri sjálva ólavsøkuna. Men so byrjar hon eisini fyri meg.

### Siðvenjan er fremst

Og tá Heðin sigur við, at ólavsøkan tá veruliga byrjar, so meinar hann við, at tá byrjar sjálvur stuttleikin eisini.

– Tað eru sjálvandi tey føroysku klæðini. Tey royni eg at brúka, tá høvi býðst, og ólavsøkan er so sjálvandi eitt av hesum. Tá vit eru ílætin, verður farið oman til setanina. Nakað, sum vit hava gjørt í nógv, nógv ár. Ikki minst er tað hugaligt at lýða á eina góða setanarrøðu. Eina røðu, sum eg sjálvur slapp at flyta fram í fjør.

Tað kann vera, at skyldurnar hjá borgarstjóranum eru fleiri kring ólavsøkuna. Men tá talan er um kappróðurin, so er siðvenjan ikki at vika.

– Kappróðurin er fastur táttur. Bæði tí mær dámar hetta væl, men eisini tí eg havi mínar skyldur á hesum. Saman við Súsonnu Dam havi eg í nógv ár verið í dómsnevndini fyri Útvarpssteypið. Er tað so, at bestu bátarnir eru javnir í stigum, so fer steypið til tann, sum hevði vakrasta róðurin á ólavsøku, og tað skulu vit meta um. Til hetta sita vit uppi á Havnarskrivstovuni, har tú veruliga hevur eitt frálíkt útsýni yvir allan róðurin.

– Eftir hetta fara vit til steypahandanina og síðani ein túr heim, har nógvir gestir aloftast koma framvið. Vit búgva rættiliga miðskeiðis í býnum, og so er náttúrligt, at fólk detta á gátt.

### Tiltøk og vitjanir

Og so er talan annars um ólavsøku, har dentur verður lagdur á at vitja ymsu tiltøkini, sigur Heðin Mortensen.

– Bæði kvøldini verða sjálvandi nýtt at spáka havnargøtur oman og niðan. Ikki minst er tað hugaligt, at tú ofta hittir fólk, sum tú kanska ikki hevur sæð í eini 10-15 ár – ella kanska meira enn so.

– Men so royni eg eisini at vitja tiltøk og framsýningar. Skrúðgongan ólavsøkumorgun er fastur táttur, eins og tað nú er soleiðis, at býráðshølini verða latin upp á ólavsøku. Tað haldi eg vera eitt fínt átak, tí tað gevur borgarunum ein møguleika at koma á gátt, eins og vit eisini hava fleiri listarverk her.

– Tað bindur meg so í nakrar tímar, men eg royni kortini at vitja so nógv tiltøk, sum eg røkki um ólavsøkuna, eins og útimøtini ofta eru hugalig at lýða á. Fleiri av tiltøkunum eru so eisini opin í døgunum eftir hátíðina, so við einum góðum vilja, so røkki eg runt, kortini.

– Men sjálv ólavsøkan endar hjá mær, eins og hjá so nógvum øðrum, við kórsanginum ólavsøkudag. Tað er ein fantastisk løta. Og hóast tú sum borgarstjóri stendur við ábyrgdini av eini stórari mannfjøld, so ber væl til at njóta løtuna, tá karmarnir eru lagdir til rættis. Og tað er eisini tað, sum tað snýr seg um. Hóast tú sum borgarstjóri hevur skyldur at røkja, so ber væl til at njóta løtuna, júst sum aðrir havnarborgarar, sigur Heðin at enda.